## Gula troyggjan av landsliðnum

Michael Rasmussen, sum í løtuni hevur gulu føraratroyggjuna í Tour de France, sleppur ikki í part á danska landsliðnum. Jesper Worre sigur vegna danska súkklusambandið, at tey eru vitandi um, at Rasmussen í fleiri førum ikki hevur sagt dopingmyndugleikunum frá, hvar hann venur. Dopingmyndugleikarnir hava rætt at gera ófráboðað eftirlit – eisini til venjingar – men tað er nú heldur trupult, um tað ikki ber til at finna súkklaran, skilst.



## Tvær finalur í Aberdeen

Bæði U15 og U17-landsliðini hjá dreingjum hava spælt seg í finaluna í Aberdeen Football Festival, har tey hava tikið lut seinastu vikuna. Finalurnar verða á skránni í morgin, tá U15 spælir klokkan 13. U17-liðið spælir sína finalu klokkan 15. Føroysa U17-liðið hjá kvinnum hevur eisini tikið lut í kappingini. Í bólkaspælinum stóðu tær seg somikið væl, at tær skuldu spælt finalu. FSF gjørdi tó av undan ferðini, at talan eisini var um venjingarlegu, og tí eru nakrar av kvinnunum eldri enn tað, sum loyvt er í kappingini. Og undan kappingini varð avtala tí gjørd um, at føroyska liðið ikki kundi verða partur av eini møguligari finalu.

## Dreymamál frá Símuni

**Við drønhøggi úr 25 metrum vissaði Símun Samuelsen sigurin, tá Keflavík í gjárkvøldið vann 3-2 á FC Midtjylland**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*fo"jakup@sosialurin.fo*

Jógvan Martin Olsen var millum áskoðararnar, tá Símun Samuelsen enn eina ferð tók stóru yvirskriftirnar fyri Keflavík.

Dagurin tóktist annars einki serligur hjá Keflavík, tá FC Midtjylland eftir bara 20 minuttum hevði skotið seg upp á 2-0.

Men Keflavík sýndi eyðkenda íslendska treiskni, tá teir noktaðu at geva seg yvir. Og ikki minst átti Símun stóru lut í hesum. Eftir at Guðmundur Steinarsson hevði minkað um munin, breyt Símun brádliga ígjøgnum í vinstru. Neyva inn-leggið fann Tórarinn Kristjánsson, og so stóð á jøvnum, tá farið varð til hálvleik.

Og so var tað aftur Símun, sum stjól myndina. 12 minuttir eftir steðgin høgdi hann til úr 25 metrum, og vakurt smoygdi bólturin sær innundirsamankomingina uttan nakran sum helst møguleika hjá danska málverjanum.

Við sigrinum hevur Keflavík eitt ikki heilt ógjørligt útgangsstøði undan seinna dystinum, tó at FC Midtjyllan við tveimum útivøllarmálum eisini fer at spæla fyri sínum møguleika.

B36-Ekranas 1-3 (1-2):

# Misnýttir møguleikar kostaðu B36

**B36 misnýtti nógvar stórar málmøguleikar í dystinum móti Ekranas í gjár, tá ið liðini møttust í UEFA Cup á Tórsvølli**

FÓTBÓLTUR
*Pætur Albinus*
*patur@sosialurin.fo*

Ikki stóð B36 langt aftanfyri Ekranas FK, tá ið liðini møttust á Tórsvølli í gjárkvøldið. Formulafótbólturin hevur hildið summarsteðg í nakrar vikur, og hetta sást í løtum væl á spælinum. Ekranas vísti ikki serliga sannførandi spæl, men í avgjørandi løtunum slógu teir til, og hetta var við til at tryggja teimum 3-1-sigurin.

### B36 betur frá landi

Bara nøkur sekund vóru farin av dystinum, tá ið B36 fekk fyrsta stóra málmøguleikan. Bergur varð spældur leysur í vinstru síðu, men komin at málmanninum rakti skotið mitt á málmannin.

B36 var betra liðið fyrsta korterið, men heldur hinvegin var tað Ekranas, ið kundi leggja seg á odda. Hetta gjørdu teir í 13. minutti, tá ið hornaspark alt ov lætt endaði fyri fótunum hjá Povilas Luksys, sum ikki sveik.

Nógvar innanhýsis leikvillur vóru at síggja hjá báðum liðunum, og hetta togaði leikferðina í dystinum langt niður til tíðir.

Men B36 spældi seg meir enn so fram eftir vøllinum, og einu ferðina hilnaðist somikið væl, at teir skoraðu. Gott spæl í høgru síðu endaði við, at Bergur Midjord sendi bóltin inn til Inga Højsted, ið trygt javnaði fyri B36.

Men gleðin var stokkut. Bert ein minutt undan steðginum legði Ekranas seg aftur á odda, og aftur eftir horna. Hesaferð æt málskorarin Gediminas Paulauskas.

### Óneyvir

Í seinna hálvleiki legði B36 trýst á Ekranas langt frammi á vøllinum. Hetta førdi til nógv mótálop til Ekranas, men B36 fekk eisini tilspælt sær nógvar møguleikar. Hanus Thorleifsson kom einu ferðina einsamallur móti málmanninum, men málmaðurin bjargaði.

Í 66. minutti fekk Sylla ein risa møguleika, men rakti við síðuna av málið. Hetta kostaði minuttin seinni í hinum endanum, tá ið Sergeij Pogreban rak B36-verjuna av, og skoraði til 3-1.

B36 fekk tveir stórar møguleikar at minka um munin. Sylla var einu ferðina leysur móti málverjanum, men fekk ikki skot á bóltin. Størsta møguleikan átti Mikkjal Thomassen, tá ið hann fekk brotsspark. Hesum skotinum bjargaði litaviski málmaðurin tó, og B36 hevur nú eitt sera truplult útgangsstøði til returdystin í Litava um tvær vikur.



*Litavisku leikarararnir vóru til tíðir nakað harðligir, men gula kortið hjá slovenska dómarinum sat nakað djúpt í lummanum. Hinvegin fekk B36 fimm gul kort*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

MyPa-EB/Streymur 1-0 (0-0):

# Størsta vónin er í Sundalagnum

**Fjálturin fór skjótt burtur í altjóða frumdystinum hjá EB/Streymi, og tað verður roknað við møguleikanum at samansetta liðið skal spæla seg í næsta umfarið**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Enn eitt føroyskt felag hevur nú roynt seg í europeisku kappingunum. Tað er EB/Streymur, sum framvegis eigur til góða at skjóta mál í altjóða dysti. Teir taptu 1-0 í Finlandi ímóti ímóti MyPa. Einsamalla málið varð skorað, tá ið tað restaðu 12 minuttir.

- Úrslitið ber væl til at liva við. Sjálvandi hevði tað gjørt uppgávuna á heimavølli lættari, um vit høvdu fingið mál burtur úr einum av fáu møguleikunum, sum vit høvdu. Men vit fara á heimavølli at spæla fyri møguleikanum, verður sagt úr EB/Streyma ferðalagnum, sum nú er á veg aftur til Føroya.

EB/Streymur skal spæla á Tórsvølli hósdagin 2. august. Tá verður tikið at syrgja fyri, at finsku mótstøðumenninir ikki skjóta mál, og so skal EB/Streymur skjóta mál. Í Finlandi høvdu Hans Pauli Samuelsen og Ronnie Samuelsen møguleikar, og í síðstu løtu var um reppið, at Sorin Anghel spældi Arnbjørn Hansen blankan fyri málinum.

Heimaliðið var greitt omaná. Fyrstu løtuna var fjáltur á EB/Streyma monnunum, men sum 1. hálvleikur leið, fótaðu teir sær og royndu at spæla. René Tórgarð var sannur brandur í málinum, og ofta vórðu skotroyndir blokeraðar av føroyingunum, sum sýndu fínan hugburð og ofraðu seg.

MyPa økti um trýstið í 2. hálvleiki, og tá ið lítið kortrer restaði skoraðu teir framúr vakurt mál við skoti

Tað verður torført hjá EB/Streymi, men tepra tapið í Finlandi ber við sær, at avbjóðingin ikki er heilt ómøgulig, tá ið MyPa fer at vitja her um tvær vikur.

### FAKTA

**MyPa-EB/Streymur 1-0 (0-0)**
**EB/Streymur:** René Tórgarð – Bárður Olsen, Egil á Bø, Marni Djurhuus (Gert Hansen, 82.), John Heri Dam – Hans Pauli Samuelsen, Zsolt Zekeres, Símun Eliasen, Ronnie Samuelsen, Arnbjørn Hansen (Hanus Eliasen, 75.) – Károly Potemkin (Sorin Anghel, 60.)
**Á beinkinum uttan at verða skiftir inn:** Brian Hansen, Brian Olsen, Esmar Eiðisgarð, Teitur Joensen
**Venjarar:** Piotr Krakowski og Sámal Erik Hentze